# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Hvussu eg bar meg at við at fáa Birthe Rønn Hornbech at taka av? Vit hava eitt serligt samband (Anders Fogh Rasmussen)*

# Nýtt og gott gamalt í Danmark

**Fleiri høvdu væntað, at Anders Fogh Rasmussen fór at manna stjórnina við yngri kreftum, men so varð ikki**

Anders Fogh Rasmussen hevur givið tekin um, hvør skal loysa seg av sum floksformann og forsætisráðharraevni hjá Vinstra, men tann nýggja stjórnin boðar ikki frá tí ættarliðsskifti, sum fleiri danskir eygleiðarar høvdu roknað við.

Kanska heldur tvørturímóti. Tann einasti úr tí yngra ættarliðnum, sum slapp upp í part, er vinstramaðurin Troels Lund Poulsen, sum skal umsita umhvørvismál.

Í hinum aldursendanum var tað óvæntað, at vinstrakvinnan Birthe Rønn Hornbech kom í stjórnina, har hon umsitur innflytara- og kirkjumál. Tað er alment kent, at Birthe Rønn Hornbech og Danski Fólkaflokkurin hava ikki drigið eina línu í spurningum um innflytarar, og eygleiðarar tulka tilnevningina av henni sum eitt tekin frá forsætisráðharranum um, at hann er sinnaður at snara eitt sindur frá teirri hørðu kósini hjá stuðulsflokkinum.



*Átta nýggir ráðharrar og ráðharrar, sum skiftu ráðstovu: Ovast frá vinstru: Lars Løkke Rasmussen, Troels Lund Poulsen, Birthe Rønn Hornbech og Bertel Haarder. Niðara rað frá vinstru: Karen Jespersen, Carina Christensen, Jacob Axel Nielsen og Connie Hedegaard.*

Politiskir eygleiðarar í Keypmannahavn siga, at forsætisráðharrin hevur valt at fáa sær eina stjórn, sum er sett saman av royndum politikarum, samstundis sum ráðharravalið boðar frá, at hann vil hava eina meiri ágangandi stjórn.

**3. stjórnin hjá Anders Fogh Rasmussen:**

Forsætisráðharri: Anders Fogh Rasmussen.
Búskaparráðharri: Bendt Bendtsen.
Fíggjarmálaráðharri:Lars Løkke Rasmussen
Uttanríkisráðharri: Per Stig Møller.
Vælferðarmálaráðharri: Karen Jespersen
Arbeiðsmarknaðarráðharri: Claus Hjort Frederiksen.
Løgmálaráðharri: Lene Espersen.
Heilsumálaráðharri: Jacob Axel Nielsen
Innflytaramálaráðharri: Birthe Rønn Hornbæk
Umhvørvismálaráðharri:Troels Lund Poulsen
Orku- og veðurlagsmálaráðharri: Connie Hedegaard
Mentamálaráðharri: Brian Mikkelsen.
Kenslumálaráðharri: Bertel Haarder
Vísindamálaráðharri: Helge Sander.
Samferðslumálaráðharri: Carina Christensen
Matvørumálaráðharri: Eva Kjer Hansen.
Menningarmálaráðharri: Ulla Tørnæs.
Verjumálaráðharri: Søren Gade.
Skattamálaráðharri: Kristian Jensen.

# Sætti hvør New York-búgvi hevur ov lítið til matna

**1,3 mió. fólk í New York eru so fátæk, at tey hava ikki ráð til at keypa sær mettuna**

Felagsskapurin The New York City Coalition Against Hunger vil sambært BBC vera við, at sætti hvør borgari í býnum hevur ov lítið til matna, og at bíðiraðirnar á matveitingarstøðunum eru vorðnar 20 prosent longri hetta seinasta árið.

Orsøkin til gongdina er sambært felagsskapinum, at fátækradømið er vaksið í New York hetta seinasta árið, samstundis sum tað almenna hevur skert stuðulin til tey fátæku.

Á matveitingarstøðunum, sum eru ætlað teimum fátæku, hava tey spurt, um fólk halda seg fáa nóg mikið til egnan tørv. 57 prosent svaraðu, at tey fáa ikki nóg mikið. Sambært The New York Coalition Against Hunger søgdu 48 prosent tað sama í fjør.



*12,6 mió. húsarhald í USA siga, at tey hava ov lítið til matna. Tað svarar til umleið 30 mió. fólk*

(Mynd: AP)

## STUTT SAGT

### Sjáldsom vitjan

Eftir innbjóðing frá japanska forsætisráðharranum, Yasuo Fukuda, hevur kinesiski forsetin, Hu Jintao, gjørt av at fara til Japan at vitja næsta ár. Seinast ein kinesiskur forseti var í Japan, var í 1998, tá Jiang Zemin var í Tokyo, men vitjanin endaði í ruðuleika, tí londini fóru at keglast um fortíðina. Síðani eru fleiri innbjóðingar farnar úr Tokyo til Beijing, men ikki fyrr enn nú er nakað komið burturúr. Politiskir eygleiðarar siga, at tey bæði búskaparligu stórveldini hava nógv at tosa um. Eitt nú eru tey ósamd um rættindini til gassið undir havbotninum í Eysturkinesiska Havinum.

### Howard revsar felagar

Forsætisráðharrin í Avstralia, John Howard, viðgekk í gjár, at tveir týðandi limir í flokki hansara, Liberala flokkinum, høvdu medvirkað til at bera almenninginum ein bókling, sum knýtir Arbeiðaraflokkin at islamskum yvirgangsmonnum. Í bóklinginum, sum Islamska Fylkingin í Avstralia hevur skrivað, takka útgevararnir Arbeiðaraflokkinum fyri at hava stuðlað indonesisku monnunum, sum blivu dømdir fyri bumbuatsóknina á Bali í 2002. Atsóknin var óvanliga ógvuslig og kostaði 202 mannalív. Á tíðindafundi í gjár segði John Howard, at teir báðir floksfelagarnir hava fingið sekkin. Val verður í Avstralia um vikuskiftið.

### Óvanlig blaðgrein í Iran

Tað hevur vakt stóran ans í Iran og aðrastaðni, at eitt iranskt blað hevur funnist hvassliga at Mahmoud Ahmadinejad, forseta. Millum annað heldur blaðið, at framferðin hjá forsetanum er óheppin fyri iranska samfelagið og tænir ikki landsins áhugamálum í altjóða høpi. Blaðið skrivar eisini, at atburðurin hjá forsetanum elvir til spjaðing innanlands. Útlendskir eygleiðarar halda tað vera sera áhugavert, at greinin stendur í einum blaði, sum verður hildið at hava tætt tilknýti til tann týðandi átrúnaðarleiðaran Ali Khaminei.